# Tann øvugta verð

***Danmark:** Saman við Brøndby stríðist Herfølge við at sleppa úr botninum í Superliguni. Í fjør stríddust tey um gullmerkini*

Jákup Mørk

Tað kann væl vera, at nógv verður sagt um donsku superliguna av bæði penum og minni orðum. Eitt kann tó undir ongum umstøðum sigast, og tað er at hon er løtt at spáa um.

**Vent í holuni**
Undan kappingarársbyrjan í fjør, varð Herfølge av flestu serfrøðingum roknað sum niðurflytingarevni, men ístaðin tóku teir øll á bóli, við at enda ovast á sigursskammilinum, tá avtornaði. Beint framman fyri sigursvanda Brøndby.

Tá varð Brøndby roknað sum fremsta evnið til meistaraheitið, og tað eru teir sum so eisini í ár.

Støðan í løtuni er tó tann, at Herfølge og Brøndby liggja sum nr. 2 og 3 tá roknað verður frá botninum. Er hetta óvæntað, er tað ikki minni óvæntað, at FCK bert er nevið framman fyri Brøndby á fjór niðasta sessinum. Hetta hóast øll høvdu roknað við, at felagið við nýggja venjaranum, Roy Hodgson, hevði fingið júst tað, sum skuldi til, fyri at geva liðnum eitt spark rætta vegin.

**Føroyingarnir taptu**
Yvirhøvur var talan ikki um nakað gott vikuskifti, um hugt verður at úrslitunum við føroyskum eygum.

Tey trý liðini, sum hava føroyingar knýttar at leikarahópinum taptu nevnliga sínar dystir.

Ringst stendur í løtuni til hjá Herfølge. Á heimavølli máttu teir lúta heili 5-1 fyri Viborg, og óneyðugt skuldi verið at sagt, at tað var langt í frá meistaraspæl, sum meistararnir sýndu í framskundaða dystinum fríggjadagin.

Óli Johannesen er framvegis ikki at síggja á liðnum hjá AGF, sum undan sunnudegnum var oddalið við fullum stigatali. Í Odense komu teir tó so dyggiliga niður aftur á jørðina, og í donsku miðlunum verður sagt, at 4-0 sigurin hjá OB var fult uppiborin. Ja, á TV3 undraðis frásøgumaðurin á, hvussu AGF hevði borið seg at við at fáa fulla úrtøku móti bæði Brøndby og FCK.

Todi Jónsson og FCK máttu á heimavølli taka til takkar við einum 2-1 tapi móti Lyngby. Júst Lyngby er fyrrverandi felagið hjá Toda Jónssyni, eins og fleiri aðrir FCK áður hava roynt seg í hesum felag.

Harumframt var núverandi FCK stjórin, Flemming Østergaard stjóri í Lyngby fyri fáum árum síðani, so alt í alt mundi sigurin kennast eyka søtur hjá Lyngby áskoðarunum. Hjá FCK áskoðarunum var smakkurin av hesum tó einki serligur, og eftir dystin var eisini rok millum áskoðararnar hjá liðunum báðum.

**Sleppa víðari**
Hóast Herfølge í løtuni ikki líkist nøkrum meistaraliði, so fyrireika teir seg í hesum døgum til seinasta undankappingarumfarið í europeisku kappingini fyri meistaralið.

Mótstøðuliðið er skotska stórfelagið, Glasgow Rangers, og sum vera man, er spenningurin stórur í Herfølge.

Nógv verður gjørt burtur úr fyrst europeisku luttøku felagsins yvirhøvur, og tað er eisini líkt til, at alt hetta stákaríið hevur ávirkað leikararnir í felagnum:

– Eg eri sjálvandi øgiliga spentur upp á, hvussu tað fer at ganga móti Glasgow, men samstundis gleði eg meg eisini til alt hetta rokið er liðugt, sigur føroyski landsliðsmálverjin, Jákup Mikkelsen, úr Herfølge.

Hann leggur tó afturat, at hetta ikki skal skiljast sum nøkur umbering fyri vánaligu úrslitini seinastu tíðina:
– Tað er bara so ótrúliga stórt fokus vent ímóti hesum, at vit nærum hava hug at gloyma alt annað. T.d. sá tað fríggjadagin út til, at vit vóru fullkomulia líkasælir um tapið. Eingin østi seg, tá hinir skoraðu, og við fleiri av málunum vóru vit ógvuliga passivir, sigur hann.

Um Jákup og teir fáa frið í hjartað eftir dystin, skal eg lata vera ósagt, men í øllum førum royna teir at fyrireika seg á best gjørligan hátt til stóru uppgávuna.

Venjarin, John Faxe Jensen, hevur verið í Skotlandi og hugt at Rangers, og frá týsdegnum at rokna, verður allur hópurin saman, soleiðis at eingin órógv skal vera.

Hvussu taktikkurin fór at verða, visti Jákup ikki, men hann roknaði tó við, at venjarin fór at seta seg sjálvan á vøllin: Tað eru so fáir leikarar hjá okkum, sum hava roynt at spælt í europeiskum høpi áður, og tí kann Faxe helst skapa eitt sindur av friðið, heldur Jákup.

**Ársins venjari**
Mitt í øllum hurlivasanum millum botnstríð og Champions League, er Faxe annars kosin ársins venjarin.

Tað eru donsku venjararnir, sum kjósa ársins venjara, og Faxe duldi ikki fyri, at hann var fegin um henda heiðurin.

Óvæntað var tað tó á ongan hátt, at valið fall á júst Faxe. Í fyrstu roynd síni sum venjari eydnaðist tað honum at gera eitt botnlið til meistara, og tað í sjálvum sær er einki minni enn eitt bragd. Harumframt er tað fyrstu ferð yvirhøvur, at ein leikandi venjari megnar at fá gullmerki.



John Faxe Jensen fekk sunnudagin heiðurin av at verða kosin ársins venjari í Danmark




# TB sterkari

**2. deild:** Tvørámenn tykjast meina tað í álvara, tá teir siga seg vilja í bestu deildina

Jákup Mørk

*TB-GÍ 4-1 (0-1)*

Av Tvøroyrir hevur alt árið ljóðað, at teir ætla sær at vinna sessin í bestu deildini aftur sum skjótast. Fram til 1988, tá flutti niður fyri fyrstu ferð, var tað sjálvsagt, at teir hoyrdu heima í fremstu røð, men soleiðis er ikki longur.

Eftir gullrúsin í 1987, gekk av skriðjuni til árið eftir, og síðani tað hevur lagna teirra verið sera misjøvn, hóast teir bæði í 1991 og 1995 vóru sera væl við fyrsta partin av kappingarárinum.

**Gera seg til**
TB mundi vera millum tey feløgini, sum vórðu harðast rakt, tá kreppan herjaði í Føroyum. Fráflytingin var stór á Tvøroyari, og fyri fótbóltin hevur hetta merkt, at TB hevur mist fleiri árgangir av fótbóltsleikarum. At siga at TB varð rakt meinast, er kanska ikki rætt, men í øllum førum er skaðin sera sjónligur á Tvøroyri. Eisini tí fleiri av meira royndu leikarunum eru farnir í onnur feløg at royna seg, tá úrslitini ikki vóru eftir vild á Tvøroyri.

Nú er onkur nýggjur árgangur tó um at daga fram, og saman við meira royndum leikarum verður so roynt at lova hesum upp í fremstu deildina at royna seg.

Í vár var Oli Johannesen leigaður heim til barndómsfelagið at styrkja um, og hetta var stórur styrkur at fáa. TB lá saman við EB/Streymi fremst, tá farið varð í summarfrí, og hóast Óli nú er farin aftur til Danmarkar, tykist TB liðið ikki viknað í mun til fyrru kappingarhálvu, heldur tvørtur ímóti.

Liðið var nevnliga meint rakt av skaðum beinan vegin, sum kappingarárið byrjaði, og skadu leikararnir eru so at siga allir komnir fyri seg nú. Har umframt eru Eyðun »Gullok« Svalbard og Birgir Jørgensen farnir í ríputa búnan, umframt at leiðslan eisini hevur fingið fatur á miðvallaranum, Mahei Matei úr Rumenia.

**Gjørdu um seg**
Tað vóru eisini júst hesir tríggir, sum tryggjaðu TB framhaldandi luttøku í oddastríðnum, har teir enn eru javnir við sundalags- og eiðismenn.

Hóast Heini Heinason hevði lagt GÍ fram um í fyrra hálvleiki, so var TB omaná meginpartin av tíðini, og í seinna hálvleiki gav hetta at bíta.

Fyrst javnaði Gullok, eftir at Birgir hevði lyft tvørtur um, og síðani var Birgir aftur faddur, tá Gullok slapp at skjóta sítt næsta mál. Hesu ferð við brotssparki.

Rumenski leikarin økti til 3-1 eftir hornaspark, áðrenn Birgir Jørgensen sjálvur setti seinasta seymin í, tá hann við høvdinum stýrdi innleggi í málið.

Sostatt kann ikki sigast annað enn, at nýggju menninir gjørdu um seg á Tvøroyri, og verður hetta lagið framyvir, nýtist tvøráfólki kanska ikki at bíða so leingi afturat.

**TB-GÍ 4-1 (0-1)**
0-1: Heini Heinason
1-1: Eyðun »Gullok« Svalbard
2-1: Eyðun »Gullok« Svalbard (br.)
3-1: Mahei Matei
4-1: Birgir Jørgensen



# Leirvíkingar dala

*2. deild: Meðan fuglfirðingar framhaldandi halda fast í vónini um uppflyting til 1. deild*

Jákup Mørk

LÍF-ÍF 0-2 (0-1)

Fyri ikki so nógvum árum síðani taldust liðini bæði millum føstu gestirnar í fyrstu deild. Rákið seinnu árini hevur tó havt við sær, at bestu leikararnir eru rýmdur til onnur feløg at royna seg, og meðan ÍF av og á hevur vitjað í bestu deildini, so hevur LÍF ongantíð megnað at lyft sær, síðani teir í 1988 fluttu niður úr bestu deildini.

Støðan í Leirvík leygardagin bendi heldur ikki á, at tað verður í bræði, at leirvíkingarnir verða aftur at síggja í fyrstu deild.

Yvir ein kamb kann sigast, at tað vóru fuglfirðingar, sum stóðu fyri størsta partinum av undirhaldinum, og hóast teir sjáldan komu til teir heilt stóru málmøguleikarnar, so var tað til tíðir gott fótbóltsspæl frá teirra síðu.

Leirvíkingar royndu hinvegin at dúva mest upp á verjupartin, fyri síðani at seta skjót mótálop í gongd, men rættuliga møguleikar gjørdist talan ongantíð um.

Tað eydnaðist ÍF at leggja seg á odda nakað fyri hávleikssteðgin við einum máli, sum Høgni á Lakjuni stóð fyri.

Hetta hendi, eftir eitt sera gott álop, har Høgni við kvikum eitt-tvey spælið kom leysur ígjøgnum, og hegnisliga lyfti hann bóltin upp um málverjan, tá hesin kom út.

LÍF megnaði ongangíð veruliga at hótta leiðsluna hjá heimaliðnum, og allur spenningurin var so at siga fokin, longu áðrenn ÍF økti um leiðsluna.

Málverjin og verjuspælari hjá leirvíkingum misskiltu hvønn annan, og endin av øllum var, at Ken Bærendsen púra leysur stútaði móti málinum. Bólturin hevði helst kós móti meskunum, men fyri at eingin ivi skuldi vera, kom John Thomsen rennandi, og hann gav bóltinum seinasta skumpið inn um strikuna.

Sum nevnt omanfyri, so var ikki nógv, sum bendi á, at LÍF hevur nakrar bráðfeingis ætlanir um at venda aftur til bestu deildina. Tað má man hinvegin siga, at fuglfirðingar hava.



# Spæla aftur í Íslandi í morgin

*Ísland: Nú má Leiftur venda gongdini, um felagið skal sleppa undan niðurflyting*

Føroysku spælararnir í Íslandi skulu aftur í eldin í annaðkvøld. Um vikuskiftið vóru eingir dystir spældir í bestu íslendsku deildini, men í morgin eru fýra dystir á skránni.

Leiftur, sum millum annað er mannað við fýra føroyskum spælarum, skal spæla á útivølli ímóti Grindavík, sum liggur nummar 5 á stigatalvuni. Leiftur er aftast í Landssimadeildini, og teir verða noyddir at venda gongdini nú, um teir skulu sleppa undan niðurflyting.

Leiftur, sum Jens Martin Knudsen er venjari hjá, hevur sjey stig, Stjarnan hevur 10 stig, og triðasta liðið, sum er Fram, hevur 15 stig. Tvey tey aftastu liðini flyta niður, og tí hevur Leiftur 8 stig at vinna inn, áðrenn liðið kemur upp um strikuna. Leiftur hevur tveir dystir til góðar.

Liðið hjá Páll Guðlaugssyni, Keflavík, kann geva Leiftri eina hjálpandi hond, um teir í annaðkvøld vinna dystin ímóti Stjarnan, sum er næstaftast.

Uni Arge og hinir í ÍA spæla ikki í morgin.

1. deildarfelagið, Válur, har Pól Thorsteinsson spælir, spælir næsta dystin fríggjakvøldið.

*ek*



# Mál-Kurt ger um seg

**Noreg:** Kurt Mørkøre skoraði fýra ferðir, tá Sogndal vann stórsigur sunnudagin. Kurt er nú greiður toppskjútti í norsku 1. deild

EyÐun Klakstein

Kurt Mørkøre gjørdi rættiliga um seg, tá Sogndal sunnudagin spældi landskappingardyst ímóti Eik Tønsberg.

Longu tá 25 minuttir vóru spældir av dystinum hevði Kurt gjørt hattrick og harvið lagt sítt felag fram um 3-0. Dysturin var javnur hetta tíðarskeiðið, men munurin millum liðini var, at Kurt tók hvønn einasta kjans, hann fekk.

Eik Tønsberg javnaði fyri hálvleikssteðgin, men beint eftir steðgin syrgdi Kurt fyri, at Sogndal kom fram um 4-1, og eftir hetta málið var stórur munur millum liðini. Sogndal skoraði tríggjar ferðir afturat, og eina av málunum legði Hans Fróði Hansen upp til. Hann fekk eisini eitt gul kort seint í dystinum.

Triðji føroyingurin í Sogndal, Julian Johnsson, spældi allan dystin á miðvøllinum.

**Besta keypið**
Kurt Mørkøre er nú greiður toppskjútti í 1. deild í Noregi. Hann hevur gjørt 15 mál í 17 dystunum, og tað eru trý mál fleiri enn teir næstbestu, sum millum annað er fyrrverandi landsliðsspælarin Jostein Flo.

Síðani Kurt kom til Sogndal at spæla, hevur tað gingið sera væl hjá honum at gera mál. Hann hevur samanlagt skotið 31 mál í 38 dystum fyri Sogndal, og tað eru tøl, sum ein og hvør áleypari kann verða stoltur av.

– Eg havi góðar spælarar rundan um meg, og so er tað lætt hjá mær at standa inni í brotsteiginum og fáa bóltin spældan fyri føturnar, sigur Kurt Mørkøre.

Í Sogndal rópa tey hann millum annað Kong Kurt og Kurt Måløre, og viðhaldsfólkini hjá Sogndal eru sera fegin um sín føroyska málskjútta. Tað er leiðslan í Sogndal eisini, og tað verður mett, at Kurt er tað besta keypið hjá Sogndal nakrantíð.

– Tað er stórur munur á at spæla í Føroyum og 1. deild í Noregi, tí her eru spælararnir nógv betri fyri kropsliga, og ferðin á spælinum er høg allan dystin, sigur Kurt Mørkøre.

Men hóast munin millum føroyskan og norskan fótbólt, hevur álopsspælarin fótað sær væl í Noregi, og tá hann nú kemur heim til landsdystin ímóti Danmark um 8 dagar, hevur hann nógv mál í gaggunum.

**Nær uppflyting**
Sogndal, sum framvegis liggur nummar 3 í 1. deild, hevur skotið flest mál av 1. deildarfeløgunum, og tað er ikki minst takka veri avrikinum hjá Kurt.

Møguleikarnir fyri at røkka uppflytingini eru til staðar, men tað er munur millum at vera nummar 2 og 3 í 1. deild. Tvey tey fremstu liðini flyta beinleiðis upp í Tippuliguna, meðan nummar 3 fær ein kjans í uppflytingardysti ímóti triðaftasta liðnum í bestu deildini.

Sogndal er í løtuni fimm stig frammanfyri nummar 4 og hevur ein dyst til góðar, so møguleikarnir fyri at í minsta lagi at halda fast um triðja plássið eru góðir. Frammanfyri Songdal eru Lyn, sum er langt fremst við 46 stigum, og Strømgodset, sum hevur 34 stig. Sogndal hevur 32 stig.

Komandi sunnudag skal Sogndal spæla ímoti Tromsdalen, sum liggur nummar 6.